Leygarkvøldið hetta vikuskiftið var upplivingin ein heilt onnur, tá Høgni spældi fyrstu almennu konsertina í Føroyum, síðan hann fekk planetina.

- Eg havi búð niðrið alla tíðina, so eg havi ikki føling við, hvussu fólk hevur tikið ímóti fløguni. So tað kendist gott at spæla fyri nógvum fólki í á stóra pallinum á Asfalt.. Har hevði eg eisini bólkin við. Á konsertini í Århus var eg einsamallur, sigur Høgni.

Høgni spældi eisini á bæði G!Festivalinum og á Summar Festivalinum. Hesar konsertir gjørdust eisini væleydnaðar. Eini 1.500 fólk vóru komin saman á spæliplássinum í Syðrugøtu, meðan eini 2.500 vóru í FLAGS teltinum í Klaksvík. Á konsertunum í Føroyum upplivdi Høgni fyrstu ferð, at fólk sang við til hansara løg, og hetta var ein góð kensla, viðgongur hann.

- Eg verið motiveraraður til eisini at vilja uppliva hetta uttanlands, sigur hann.

Høgna dámdi væl at spæla á Summar Festivalinum, tí hetta var ein heilt nýggj uppliving. Her var eisini sera týðiligt fyri Høgna, at hansara tónleikur vendur sær til ein sera breiðan lurtaraskarða, tí her vóru bæði ung og gomul á konsertini.

## Ísland varnaðist Høgna

Í sambandi við AME-Reykjavík gjørdist Høgni eitt rættiliga kent navn í Íslandi. Lagið Morning Dew var í a-rotatión á fleiri útvarpsstøðum m.a. størstu støðini Rás 2. Eisini var lagið við á fløguni 100% Summar, ið er ein væl dámd íslendsk fløga við aktuellum hittum. Seinni hevur TUTL eisini givið fløguna út í Íslandi.

Í kjalarvørrinum av AME Reykjavík var Morning Dew inni á almenna hittlistanum hjá íslendsku tónleika niðurtøku heimasíðuni tonlist.is.

Høgni var nógv umbiðin maður í Reykjavík og gjørdi samrøður bæði í útvarpi, sjónvarpi og stóru bløðini. Hann var mettur sum høvuðsnavn á konsertini í NASA, og spældi beinleiðis í mentanarsendingini Kastljós beint fyri tíðindini á størstu íslendsku sjónvarpsrásini.

Høgni sigur, at hann var sera glaður um túrin til Íslands og metur, at luttøkan á AME-Reykjavík var orsøk til, at hann seinni á árinum slapp á luttaka á víðagitna íslendska festivalinum Iceland Airwaves. Høgni greiðir frá, at fyriskipanin hjá Norðurlandahúsinum, Menningarstovuni og íslendska Ásgeiri Eyþórssyni var sera góð. Hann sigur, at longu í Clickhaze døgunum vitjaði hann Ísland, og at hetta er eitt land, ið honum dámar væl at vitja. Hann vónar at sleppa aftur til Íslands at spæla skjótt.

## Benelux og Sveis bíðar

Morning Dew er givin út í Sveis, men her hevur sølan verið millum lítið og eingin. Hetta hevur ivaleyst verið merkt av, at Høgni ikki hevur havt stundir at spæla har. Hetta vónar hann at kunna bøta um. Í februar er Høgni boðin at luttaka á einum norðurlendskum festivali í Sveis. Fyrsta fløgan hjá Høgna var fyrsta norðurlendska fløgan, sum felagsskapurin handan festivalin gav út í Sveis, og síðan hetta er virksemið hjá felagsskapinum vaksið til at fevna um allan norðurlendskan tónleik. Í sambandi við hesa konsert, vónar Høgni eisini at sleppa at spæla í onkrum av Benelux londunum. Danski tónleikafelagsskapurin ROSA stuðlar norðurlendska festivalinum í Sveis, og ger hetta m.a. við at senda Høgan Lisberg og bólk til Sveis.

## Vaksandi áhugi í Danmark

Høgni býr í Danmark, og fyri stuttum skrivaði hann undir útbreiðslu sáttmála við danska felagið Sonet Records. Fløgan kom út í november, men hevur ikki enn veruliga vakt nakran ans. Tað eru somikið nógvar stórar útgávur í løtuni, at pláss ikki er til litlar útgávur, sum tí hjá Høgna. Men hetta merkir ikki, at eingin áhugi er. Morning Dew er komin í rotatión á P3, ið er størsta danska útvarpsrásin, eisini er systur rásin P4 áhuga í lagnum.

Ætlanin er at fara undir arbeiðið við at breiða út navnið Høgni Lisberg í Danmark fyrst í komandi ári.

Høgni sigur, at hann hevur brúkt nógva tíð, orku og pening og brúkar hann hana til eitt visitkort. Ongantíð betur enn, at hann kann sláa í gjøgnum við henni. Men helst vil, hann at fløgan skal slóða vegin og skapa ein eftirspurning eftir Høgna Lisberg.




*Høgni Lisberg var høvuðsnavnið á konsertini á AME-Reykjavík, ið var hildin í vælumtókta spælistaðnum NASA. Konsertin var við til at festa navnið Høgni Lisberg í íslendsku tónleika tilvitskuna.*

(mynd: nud)




*Eini 2500 fólk vóru komin saman til konsertina við Høgna Lisberg í FLAGS teltinum á Summar Festivalinum.*

(mynd: nud)